# VIKULIÐIÐ

deildin VIKA 25

*Ítróttartoymi úttekur Vikuliðið, og eru leikarans avrik mett út frá Vodafone-dystunum í farnu viku.*




Uppstilling: **3-4-3**

## 1. DEILD MENN

**NSÍ - AB** 2-3 (1-2)
0-1: John Hansen 19.
0-2: Dan Petersen 34.
1-2: Árni Frederiksberg 45.
2-2: Árni Frederiksberg 48.
2-3: Dan Petersen 55.
*Reytt kort: Dion Splidt, AB, 87.*

**HB - Víkingur** 1-2 (0-2)
0-1: Martin Olsen
0-2: Andrass Mikkelsen
1-2: Yohan Borðoy br 75.
*Reytt kort: Óli Arge, HB, 82., og Jan Poulsen, Víkingur, 82.*

**FC Hoyvík - NSÍ** 2-5 (1-2)
1-0: Jack Johansen 25.
1-1: sjálvmál 35.
1-2: Andrias á Líknagøtu 40.
1-3: Magnus P. Sørensen 48.
1-4: Árni Frederiksberg 69.
2-4: Janus W. Mortensen 73.
2-5: Viggo Hansen 90.

**AB - B68** 3-2 (1-2)
0-1: Jóhan Dávur Højgaard br 33.
0-2: Jónleif Højgaard 39.
1-2: sjálvmál 40.
2-2: Jákup P. Dam 57.
3-2: Jákup P. Dam 79.

**EB/Str. - KÍ** 1-1 (0-0)
1-0: Pól G. Olsen br 48.
1-1: Sørmundur Kalsø 76.

**TB - 07** 0-2 (0-1)
0-1: Johan Ejvind R. Mouritsen 42.
0-2: Johan Ejvind R. Mouritsen 67.

### Føroyska 1. Deild *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 14 | 9 | 3 | 2 | 33 | 11 | +22 | 30 |
| 2 | TB | 14 | 9 | 1 | 4 | 34 | 17 | +17 | 28 |
| 3 | 07 Vestur | 14 | 8 | 4 | 2 | 31 | 14 | +17 | 28 |
| 4 | EB/Streymur II | 14 | 6 | 4 | 4 | 23 | 17 | +6 | 22 |
| 5 | Víkingur II | 14 | 6 | 3 | 5 | 22 | 20 | +2 | 21 |
| 6 | HB II | 14 | 6 | 1 | 7 | 24 | 33 | -9 | 19 |
| 7 | AB II | 15 | 6 | 1 | 8 | 22 | 34 | -12 | 19 |
| 8 | NSÍ II | 15 | 4 | 6 | 5 | 22 | 26 | -4 | 18 |
| 9 | FC Hoyvík | 14 | 2 | 5 | 7 | 14 | 25 | -11 | 11 |
| 10 | B68 II | 14 | 0 | 2 | 12 | 7 | 35 | -28 | 2 |

# Vágamenn vunnu á Sevmýri

## **1. DEILD MENN** Við 2-0 sigri á útivølli ímóti TB hevur 07 Vestur aftur lagt seg út í kappingina um uppflyting.

Tróndur Arge

Hóast KÍ ikki megnaði meiri enn 1-1 í Streymnesi, so er KÍ framvegis oddalið í næstbestu deildini.

Tað kemst av, at TB, sum undan uppgerðini á Sevmýri hevði møguleika at leggja seg á odda, TB tapti heimadystin ímóti 07 Vestur 2-0.

Málskjútti í báðum førum var Johan Ejvind R. Mouritsen, sum skoraði tríggjar minuttir undan steðginum og aftur miðskeiðis í 2. hálvleiki.

Sigurin ber við sær, at 07 Vestur nú hevur togað seg upp á sama stigatal, sum TB hevur. Málmunurin er tann sami, men TB er nummar tvey, tí tvøramenn hava skorað fleiri mál enn 07 Vestur.

Fjórða liðið, sum hevur møguleika at flyta upp, FC Hoyvík, er á niðurflytingarplássi. Leygardagin legði FC Hoyvík rygg til 5-2 tap á heimavølli ímóti teimum næstbestu hjá NSÍ.

Botnliðið B68 vitjaði á Argjum við góðari manning, og tað sá út til, at toftamenn skuldu vinna fyrsta sigurin á árinum, tí teir løgdu seg á odda 2-0. Men heimaliðið svaraði aftur og vann 3-2.

Talan hevur verið um góða viku hjá AB, tí mitt í vikuni vóru argjamenn í Runavík og spældu framskundaðan dyst frá 15. umfari, og teir vunnu 3-2.

At Víkingur vann 2-1 ímóti HB í gjár, og at NSÍ vann 5-2 ímóti FC Hoyvík ber við sær, at tað sær rættuliga svart út hjá B68, sum bara hevur vunnið tvey stig burturúr 14 dystum, og eisini hjá FC Hoyvík, sum er sjey stig aftanfyri NSÍ á triðja aftasta plássi.

*trondur@sosialurin.fo*

# AB tók ikki av møguleikanum

## **1. DEILD KVINNUR** Eitt flott mál frá Sofíu Purkhús í yvirtíðini staðfesti oddastøðuna hjá KÍ í bestu kvinnudeildini

Tróndur Arge

Hóast AB var á odda 2-0 eitt skifti, so eydnaðist teimum ikki at skapa spenning í kvinnudeildina.

KÍ er framvegis sjey stig á odda í landskappingini og alt bendir á, at KÍ enn eina ferð endurvinnur FM. Tað er staðfest eftir at KÍ sunnudagin spældi javnt í oddadystinum ímóti nummar tvey í landskappingini, AB. Argjakvinnurnar byrjaðu annars dystin væl og komu á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki, tá Mona Breckmann rann frá KÍ verjuni.

Stutt fyri hálvleik økti Ásleyg Súnadóttir til 2-0 og nú var líkt til at AB hála inná KÍ. Men bara ein minut seinni, minkaði Malena Josephsen úr munin til 2-1 eftir fríspark frá Rannvu Andreasen. Í seinna hálvleiki eydnaðist tað Ásleyg Sunadóttir at økja til 3-1, men enn eina ferð minkaði KÍ um munin stutt eftir. Hesa ferð var tað Rannvá Andreasen, ið skoraði.

Tá fari var um vanligu leiktíðina skoraði Sofia Purkhús útjavnandi málið, sum allarhelt staðfestur, at KÍ aftur í ár verður føroyameistari. Næsta uppgávan hjá KÍ er steypafinalan, sum verður ímóti Skála.

Í hinum dystinum sum var leiktur í bestu kvinnudeildini vann Skála á MB.

### Føroyska 1. Deild *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 12 | 10 | 2 | 0 | 58 | 9 | +49 | 32 |
| 2 | AB | 12 | 8 | 1 | 3 | 55 | 11 | +44 | 25 |
| 3 | Skála | 12 | 5 | 4 | 3 | 26 | 16 | +10 | 19 |
| 4 | Víkingur | 11 | 4 | 1 | 6 | 12 | 28 | -16 | 13 |
| 5 | EB/Streymur | 11 | 1 | 4 | 6 | 8 | 36 | -28 | 7 |
| 6 | MB | 12 | 0 | 2 | 10 | 7 | 66 | -59 | 2 |